# Kjak



Helena Dam á Neystabø
*landsstýriskvinna*

## Rættleiðing til HUXA um kringvarpsgjald

Nú politiska ungmannafelagið Huxa er farið undir at tulka lógina um kringvarpsgjald, er neyðugt beinan vegin at koma við einari rættleiðing. Tí tulkingarnar eru burturi úr vón og viti.

Huxa ákærir meg fyri at hava sett í gildi eina skipan, ið merkir at:

"**hvør** føroyingur, ið hevur internetsamband fær eykarokning, bara tí hann hevur alnet"

"**hvør** næmingur á miðnámi skal brúka tveir studningar til kringvarpsgjald um árið."

Tað er sera óheppið, at eitt politiskt ungmannfelag borðreiðir við tílíkum ósannindum. Eg vóni, at hesar útsagnir byggja á misskiljingar ella vantandi vitan. Og eg vænti, at tey sum hava sett henda tíðindaflutning í verk, nú eisini avsanna hann.

Tann 11. mai 2010 samtykti Løgtingið at broyta løgtingslóg um kringvarp, soleiðis at øll húski í landinum hava skyldu til at rinda **eitt** kringvarpsgjald, og nýggj kunngerð varð lýst 18. november 2010.

Tað merkir, at einki húski kemur at rinda meira enn í mesta lagi eitt kringvarpsgjald, sama hvussu nógv sjónvørp, útvørp, internetsambond ella fartelefonir, sum húskið ræður yvir.

Í lógini er ásett, at børn (eisini miðnámsskúlanæmingar), ið búgva heima, verða roknaðir upp í húskið, og skulu hesi sostatt **ikki** rinda egið kringvarpsgjald.

Kringvarpsgjaldið er ásett í lógini til kr. 2.900 um árið, umframt meirvirðisgjald, av hesum eru kr.1.300 fyri útvarp og kr. 1.600 fyri sjónvarp. Gjaldið er sett í lógina, fyri at eingin ivi skal vera um heimildina at krevja tað inn.

Eitt húski kann verða frítikið fyri gjaldsskylduna, um tey undirskriva eina váttan um, at tey ikki hava tól, sum kann móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya.

Sum kunnugt, eru tað í dag nógv tól, sum kunnu móttaka útvarp og ella sjónvarp. Tað er tí ein grundleggjandi misskiljing, at skyldan at gjalda Kringvarpsgjald fylgir við tí at tekna eitt internethald. Skyldan at rinda Kringvarpsgjald liggur hjá tí einstaka húskinum, og hevur húskið internetsamband, so hevur húskið eisini sjónvarp og útvarp.

**Men einki húski kemur at rinda meira enn í mesta lagi eitt kringvarpsgjald. Soleiðis er tað.**



Annika Olsen
*Landsstýriskvinna í innlendismálum*

## Lóggávuarbeiðið skal varpa ljós á rættindi hjá fólki við breki

Ì 2009 setti Uttanríkisráðið sáttmálan fyri tey sum bera brek í gildi fyri Føroyar. Ein sáttmáli, sum á mangan hátt er eitt framstig fyri hendan samfelagsbólk, ið alt ov ofta verður gloymdur í politiska rúminum. Ætlanin við hesum sáttmála er, at hann skal tryggja, at atlit verða tikin til viðurskifti hjá teimum, sum bera brek. Ì kjalarvørrinum á hesum sáttmála setti innlendismálaráðið í gildi kunngerðina um atkomuviðurskifti fyri tey, sum bera brek, ein kunngerð, sum hevði verið ávegis í 20 ár. Hetta má sigast at vera 2 stór framstig á hesum øki. Men líta vit aftur á árið 2010, kunnu vit tíverri ikki fáa eyga á nøkur nýggj frambrot til frama fyri fólk, ið bera brek. Okkara nýggjárslyfti fyri 2011 má tí vera, at vit skula bøta um hesa gongd.

Lógardygd og lógargóðska skal tryggja rættindi hjá fólki við breki

Fleiri atfinningar m.a. frá landsgrannskoðanini hava verið um manglandi lógareftirkanning og lógardygd í føroyskari lóggávu. Hesar atfinningar skulu takast í álvara. Vit hava dømi um, at lóggáva ikki verður fylgd upp við tilhoyrandi kunngerðum, og at neyðugar fylgibroytingar í øðrum lógum ikki verða gjørdar. Hetta hevur við sær, at ivi verður sáddur um galdandi rætt á økinum. Neyðugt er at samskipa alt lóggávuarbeiðið betur, og at politiska skipanin hevur eina felags fatan av týdninginum av lógardygd. Nú innlendismálaráðið varðar av lógarmálum, fer innlendismálaráðið umframt at samskipa eitt dygdargott lóggávuarbeiði millum aðalráðini at taka stig til at broyta rundskrivið um lógareftirkanning.

Ì dag skulu øll lógaruppskot, ið verða løgd fyri Tingið greiða frá, um lógaruppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar, umhvørvisligar avleiðingar, sosialar avleiðingar v.m. Ætlanin er, at ein nýggjur teigur skal verða afturat, sum skal lýsa, hvørjar avleiðingar lógaruppskotið hevur fyri fólk, ið bera brek. Ætlanin er, at hesin teigur skal viðvirka til, at ljós verður varpað á, á hvønn hátt lógaruppskotini fara at ávirka fólk við breki. Við at víðka hetta sokallaða lógarskema verða embætisfólk, ið arbeiða við lógaruppskotum og tingfólk mint á viðurskiftini hjá teimum, sum bera brek, og um lógaruppskotini hava positivar ella negativar avleiðingar fyri hendan samfelagsbólk. Ì Føroyum hevur rákið tíverri verið, at vit seta eina ørgrynnu av altjóða sáttmálum í gildi fyri Føroyar, og so halda vit, at alt stendur væl til. Hetta er ein skeivur hugburður til hesar týðandi sáttmálar, og fyri at minna fólk á, ið dagliga arbeiða við lógararbeiði, fer innlendismálaráðið umframt altjóða sáttmálan fyri fólk við breki at varpa ljós á sáttmálar sum CEDAW og altjóða mannarættindasáttmálan í krøvunum til lógaruppsetan. Vónandi kann hetta verða viðvirkandi til, at vit í 2011 fara at verða betur til at yvirhalda teir altjóða sáttmálar, sum vit seta í gildi fyri Føroyar og geva hesum sáttmálum veruligt innihald.



Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
*Býráðslimur í Klaksvík*

## Aksel Johannesen, Hvat fær Klaksvíkar sjúkrahús ístaðin?

Nú føðideildin er tikin úr Klaksvík og tann tænastan tí er tikin úr Norðurøkinum, er spurningurin, hvat fær Norðurøkið í staðin.

Kann t.d. taka eitt nokkso feskt dømi, har Helena Dam á Neystabø landsstýriskvinna tók avgerð um, at sjómansskúlin skuldi verða verðandi í Klaksvík og at maskinistarnir skuldu fáa sína útbúgving í Klaksvík. Tá gingu politikarnir í Havnini totalt amok, tí nú fór ein útbúgving úr Havnini, hóast ski psførarаútbúgvingin og maskinmeistarnir framhaldandi skuldu taka útbúgvingina í Havn. Fyri tað at ikki skal vera lygn, skuldi tað vera so fínt at útbúgvingin skuldi uppstigast til bachelor og takast á fróðskaparsetrinum, sum sjálvandi liggur í Havn. So nú verður tað sum í prikinum hjá Jákup Weihe, at tað eitur ikki longur skiparin á rituni, men professarin á rituni.

Nei her var ikki gott skil í, hildu havnapolitikarnir. Ein fekk næstan varhugan av at havnin bleiv fólkatóm og at alt fólkið fór at flýggja til Danmarkar, tí skiparaskúlin bleiv verðandi í Klaksvík. Um eg minnist rætt, so gekk eitt døgn, so komu tey sissandi tíðindini frá mentamálaraðnum til Havnafólk, at nú skuldu brúkast 10 mill innan granskning, hvar ? jú sjálvandi í Havnini, og øll fegnaðust saman við Helenu og Heðin, ja eitt framstig og tað sum við tí tilhoyrir.

So er spurningurin hjá mær í dag Aksel. Hvat fáa vit ístaðin fyri at føðideildin verður flutt úr økinum ? Kunnu vit kanska í morgin vænta, at tað verður ein samrøða við teg í ÚF um, at nú detta 10 milliónir niður í Klaksvík innan sjúkrahúsøkið ? Heilt erligt er nakað annað meira natúrligt enn tað?????????? Ella er hetta rokningin fyri at skiparaútbúgvingin og maskinmeistarnir skuldu til Klaksvíkar?